www.oljan.fo

Jan Müller 18 - 11 - 2012

Neyvan nakað kalt kríggj í Arktis

Arktiska økið er so stórt og avbjóðingarnar so mikið stórar, at hesi seta so stór krøv til samarbeiði millum heimsins lond, at tað verður als ikki pláss fyri at brúka orku og pengar uppá eitt nýtt kalt kríggj. Tað heldur arktiski sendiharrin hjá Kongaríkinum, Klavs Holm. Ì Tinganesi og á Østrøm Herfyri vitjaði danski sendiharrin fyri Arktis, umboðandi alt Kongaríkið, Klavs Holm í Føroyum fyri at kunna um sítt arbeiði og støðuna í Arktis annars. Her helt hann almennan fyrilestur á Østrum um strategiina hjá Kongaríkinum fyri Arktis fram til 2020. Tað var Fróðskaparsetrið, sum skipaði fyri tí tiltakinum. Hann vitjaði eisini í Tinganesi, har hann hitti løgmann og varð høvi eisini at greiða frá arktiskum spurningum fyri limunum í arbeiðsbólkinum, sum landsstýrið hevur sett at gera frágreiðing um eina føroyska arktiska strategi. Eftir at Sigurð í Jákupsstovu, rektari á Setrinum hevði boðið sendiharranum vælkomnan og vísti á støðu Føroya í arktiskum søguligum høpi (sí komandi grein), greiddi Klavs Holm frá sínum nýggja arbeiði og skundaði sær at sissa tey, sum bera ótta fyri hernaðarligari dubbing og stríði í Arktis. Hann helt, at arbeiðið viðvíkjandi Arktis fer í stóran mun fram í sátt og semju, tó at fótonglar eru eitt nú í sambandi við, hvørjar tjóðir skulu fáa eygleiðarastøðu í Arktiska Ráðnum og harvið kunnu vera ein beinleiðis ella óbeinleiðis partur av tilgongdini og menningini í hesum risastóra og higartil lutvíst ókenda økinum. Samstarv Talan er nevniliga um eitt so ómetaliga stórt umráði, at londini í Arktis og onnur við eru noydd til at samstarva, tá tað snýr seg um framtíðar útviklingin í økinum, og tað vilja tey eisini. Spurningurin er bara at finna rætta stevið og fáa neyðugu dialogarnar í gongd. Og hetta er nakað, sum longu er í gongd. Sendiharrin vísti staðiliga aftur teimum røddum, sum vilja vera við, at nú Arktis av álvara er komið á dagsskránna, er vandi fyri einum nýggjum køldum kríggi. Hvat viðvíkur rættinum til Arktis, so eru tað bert 5% av tí arktiska

økinum, sum ikki hoyra til nakað ávíst land. Og av teimum stóru mongdunum av olju og gassi, sum eru mett at liggja goymd í undirgrundini, liggja kanska bara 10% í økjum, sum ikki hoyra til nakað ávíst land. Hetta minkar sjálvandi um møguleikan fyri eini hernaðarligari konflikt. Tað, sum sermerkir arbeiðið í Arktis er tí eisini nettupp tað øvugta av vápnaðum stríði. Londini síggja, at her er neyðugt at brúka allar góðar kreftir til at samstarva, og eitt slíkt samstarv fer longu fram á nógvum økjum. Tað snýr seg so eisini um at fáa atgongd til fígging skulu framtíðar møguleikar troytast, og slíka kann einki einsamalt land útvega. Tí verður talan um fleirlanda projekt ella har stórar og sterkar fyritøkur taka seg saman at gera íløgur í nýggju møguleikarnar. Royndirnar at arbeiða í ísøkjunum í Arktis eru sera avmarkaðar og skulu lond ella fyritøkur til at troyta ríkidømið har, so fer tað at seta sera stór krøv til bæði íløgur, reglar og lógir fyri at fyribyrgja dálking ol. Stórar avbjóðingar standa nevniliga fyri framman, sum gera, at londini noyðast at arbeiða saman. Ein varði er longu settur í hesum sambandi, og tað er avtalan um trygd og bjarging og nú eisini oljudálking, sum kom í lag á fundi í Grønlandi, har allar tjóðirnar við atliti til Arktis vóru tilsteðar. Klavs Holm legði dent á, at hóast tað longu nú verður tosað nógv um nýggju vinnumøguleikarnar, sum gerast veruleiki, sohvørt ísurin bráðnar, so liggur hetta nakað væl frammi í tíðini kortini. Siglingarleiðir Siglingarleiðirnar eru eitt av stóru umrøðuevnunum í arktiska orðaskiftinum. Royndir eru gjørdar at sigla úr Europa til Asia gjøgnum Arktis, sum fer at stytta munandi um teinin, men hetta hevur higartil bara borið til, tí stórir ísbrótarar hava slóðað fyri. Taka vit flutningin í 2011, so var talan einans um 40 skip, sum tóku leiðina norðurum. Tá hugsað verður um, at meira enn 20.000 skip fara gjøgnum Suezveitina um árið og nakað sama tal suður um Afrika, so er greitt, at tað fara at ganga mong ár, áðrenn nýggju siglingarleiðirnar fara at verða troyttar av álvara. Men tá tað kemur hartil, so fer tað eisini at lata upp fyri nýggjum vinnumøguleikunum hjá londunum, ið liggja á farleiðunum. Eisini hvat oljuleiting og framleiðslu og útvinnan av ymsum mineralum viðvíkur, so er enn bert skjøtil settur á. Vitandi at eini 25-30% av heimsins olju- og gassgoymslum finnast í tí arktiska økinum, so er greitt, at altjóða oljufeløg fara at venda eyguni tann vegin, og tað gera tey longu, men enn í sera avmarkaðan mun. Mangar fyritøkur eru eisini í bíðistøðu og vilja tryggja seg, at álvarsligar dálkivanlukkur ikki henda. Tað ræður um at taka øll hugsandi fyrilit. Føroyar og Arktis Tá spurningurin kemur til framtíðar føroyska luttøku í Arktis heldur Klavs Holm tað vera sera umráðandi, at føroyingar gera upp við seg sjálvar, hvat man vil og ynskir og hvat man kann. Hvat kunnu føroyskar fyritøkur lata av vørum og tænastum í sambandi við, at Arktis verður latið meira upp, og í hvønn mun kunnu Føroyar gerast ein av miðdeplunum í tí umfatandi vinnu, sum fer at koma í kjalarvørrinum av, at nýggju siglingarleiðirnar lata upp! Her ræður so eisini um hjá føroyingum at fylgja við og hava ávirkan á tær avgerðir, sum skulu takast í framtíðini um mongu arktisku málini. Her ikki minst, hvussu veðurlagsbroytingar kunnu broyta umstøðurnar hjá fiskastovnunum. Eftir almenna fundin á Østrum legði arktiski sendiharrin leiðina til skrivstovuna hjá Statoil, har stjórin Rúni M. Hansen tók ímóti og greiddi frá virkseminum hjá

Statoil í Føroyum og í Arktis. Vitjanin hja arktiska sendinarranum er ein av mongum forvitnisligum vitjanum í seinastuni, har útlendingar við serligum innliti í arktis viðurskifti hava hildið fyrilestrar. Týsdagin verður skipað fyri verkstovum í Norðurlandahúsinum, har arktiskir spurningar fara at verða umrøddir. Seinnapartin verður so eisini alment tiltak í hesum sambandi.